# Heimsins elsti deyður



Heimsins elsti maður, japanin Tomoji Tanabe, doyði í morgun. Tanabe var farin at nærkast teimum 114, men í morgun orkaði hjartað ikki meiri. Tann hann fylti 113 tann 18. september í fjør, segði hann, at loyndarmálið aftan fyri hansara høga aldur var, at hann hevði altíð havt góðan matarleyst, men at hann hevði etið heilsugóðan mar. Brennivín og tubbak rørdi hann ikki. Nógvir japanar liva leingi, og serfrøðin heldur, at tað kemst av, at teir eta nógv rís og grønmeti og nógvan fisk. Heimsins elsta fólk er Gertrude Baines, sum býr í Los Angeles. Hon er 115 ár. Heimsins elsti maður er nú sambært BBC bretin Henry Allingham, sum fylti 113 tann 9. í hesum mánaðinum.

# Semja um brúgv

Um níggju ár verður tað koyrandi tvørtur um Femern-sundið millum donsku oynna Lolland og týsku oynna Femern. Tað er greitt, eftir at týska stjórnin nú hevur samtykt at gera verkætlanina saman við dønum. Verkætlanin fer at kosta 41 milliardir krónur, og av hesum skal Danmark rinda 35 milliardir. Hinar seks fara til neyðuga vegagerð í Týsklandi. Tað er kortini ikki tann danski ríkiskassin, sum skal rinda, men stjórnin skal veita trygd, so tað almenna felagið, sum skal byggja brúnna, kann læna pengarnar. Danski staturin yvirtekur so brúnna, tá lánið er goldið, og tað verður ætlandi í 2043. Brúgvin um Femern-sundið verður umleið 20 kilometrar long, og arbeiðið byrjar í 2012.

# Eg kann ikki vera allastaðni

**Sýslumaðurin í Sandoynni, Høgni í Dali, vísur øllum atfinningunum frá sær. – Eg kann ikki vera allastaðni í senn, sigur hann millum annað**

RÆTTARTRYGD
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

At sandoyingar skulu vera komnir í neyð av sær, skilir Høgni í Dali einki av. Sosialurin hevur fyrihildið sýslumanninum tey dømini, ið verða nevnd aðrastaðni her á síðunum, men einkultvís skjýtur Høgni í Dali atfinningarnar frá sær.

- Tá eitt felag velur at skipa fyri einum slíkum tiltaki sum »KomVið«, so eiga fyriskipararnir sjálvir at skipa fyri vaktarhaldinum við økinum. So tað eru teir sjálvir, ið hava ábyrgdina inni á økinum, har tiltakið er. Hetta eru krøv, ið verða sett øllum, sum skipa fyri slíkum tiltøkum, greiðir Høgni í Dali frá.

Eisini Jón Klein Olsen, politiinspektørur, vísir á júst hetta, at tá slík tiltøk verða fyriskipað, so eru tað fyriskipararnir, ið hava ábyrgdina av, at tað er nøktandi vaktarhald við økinum, og at tað inni á sjálva økinum eru fyriskipararnir – og ikki politiið – ið hevur ábyrgdina.

- Men vísir tað seg soleiðis, at kontrollørarnir eftir veruliga at hava roynt, ikki fáa tamarhald á støðuni, so er tað sjálvandi ábyrgdin hjá politinum at koma til hjálpar, greiðir Jón Klein Olsen frá.

Sýslumaðurin í Sandoynni greiðir frá, at hann var á staðnum um vikuskiftið, og koyrdi framvið har fleiri ferðir. Hann greiðir frá, at tað sá út til, at øll fyriskipan var í lagi. – Eg sá, at har gingu kontrollar í vestum, og har sá alt út til at vera í lagi, greiðir hann frá, men heldur áfram: – Eg giti bara at veruligi trupulleikin er tann, at kontrollarnir ikki hava viljað lagt seg ímillum henda bardagan. Tað veit eg ikki, men eg giti mær til tað, sigur Høgni í Dali.

Sum skilst er ein afturvendandi trupulleiki í Sandoynni tann, at tað eru nakrir ávísir menn úr einu bygdini, ið hava tað fyri at ganga í dans við eittans endamáli – at berjast. Tað skilst, at talan eisini var um hesar somu menninar hetta vikuskiftið, og at tá teir ikki fáa øst onkran upp, berjast teir innanhýsis.

Hetta tykist vera ein trupulleiki fyri sandoyingar í náttarlívinum, men eftir øllum at døma nyttar lítið at biðja kontrollar ansa eftir teimum, og løgreglan hevur einki at gera inni á økinum.

### Ikki mín uppgáva

Í samband við hini málini, ið Sosialurin eisini vísir á, vísir Høgni í Dali eisini aftur, at hann hevur gjørt nakað skeivt.

- Í samband við hasar hundarnar, so er tað uppgávan hjá kommununi at taka sær av leysum hundum. Sum politi fari eg ikki at renna eftir hundum fyri kommununa, tað er ikki mín uppgáva. Og at eg ikki var í haganum júst tá hasir menninir fóru til hendurs, tað er einki at siga til. Tað er langt hiðani, og bardagin var av, tá eg kom á staðið. Eg kann ikki vera allastaðni í senn, sigur Høgni í Dali.



*Sýslumaðurin í Sandoynni, Høgni í Dali, heldur ikki at hann kann lastast fyri allar ákoyringarnar, ið koma frá sandoyingum*

*Savnsmynd*



*Tað er ikki í lagi at sandoyingar kenna seg óvardar, heldur Jón Klein Olsen, politiinspektørur*
*Savnsmynd*

# Sandoyggin í tryggum hondum

**Jón Klein Olsen, politiinspektørur, heldur als ikki at sandoyingar skulu føla seg ótryggar. – Sandoyggin er eins væl vaktað og aðrar oyggjar, staðfestir hann**

RÆTTARTRYGD
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

At sandoyingar kenna seg ótryggar og óvardar av lógini, heldur politiinspektørurin Jón Klein Olsen als ikki vera í lagi.

- Eg kann bara staðfesta, at óansæð tíðspunkt, so kann løgreglan vera á staðnum næstan beinanvegin.

Í samband við eina aðra grein tann 26. februar, tó við somu ákærum, staðfesti sýslumaðurin í Sandoynni, Høgni í Dali, at tað var avmarkað, hvat hann hevði tíð til.

- Eg eri einsamallur um arbeiðið, og eg havi 37 tímar um vikuna. Eg royni sum frægast at tillaga løgregluarbeiðið eftir tímunum sum eg havi. Tað vísir seg jú sum at alt er pengar, og eg má halda meg til teir tímar, ið eg havi. Kortini verður nógv arbeitt yvir, tí tað er í heilum at eg verði forstýraður, tá eg eigi at hava frí, segði Høgni í Dali tá.

*Tá sýslumaðurin í Sandoynni greiðir frá, at hann bert hevur 37 tímar um vikuna, sum hann má leggja væl til rættis, merkir tað so at Sandoyggin er óvard restina av vikuni?*

- Nei, tað kann eg beinanvegin staðfesta, at tað ger tað ikki. 37 tímar er normal arbeiðsvika, men um neyðugt, kann hann arbeiða meira enn tað, skuldi tað verið neyðugt. Tá eingin politistur er til arbeiðis á Sandoynni, er tað so politiið í Havn, ið hevur ábyrgdina av oynni, og vit hava avtalur soleiðis at vit kunnu vera á oynni innanfyri minuttir. Sandoyingar eru als ikki verri vardir enn aðrir borgarar, leggur Jón Klein Olsen dent á.

**Vilja altíð betra seg**

Jón Klein Olsen vil als ikki vísa aftur nøkrum av teimum ákoyringunum, ið eru móti løgregluarbeiðinum á Sandoynni, men hann vil ikki koma so nógv inn á tey einkultu málini.

- Men tað er ikki í lagi at tey føla seg ótrygg. Um so er, at alt ikki virkar nóg væl á Sandoynni, so vilja vit altíð royna at betra tað, staðfestir Jón Klein Olsen, politiinspektørur.